

*Maiken t.v. og Eydna, døtur Niels Andreassen var eisini við til minningarhaldið*

bandið við pápafamiljuna og tað varð eisini gjørt. Maiken minnist, hvussu hon plagdi at vitja systkini hjá pápanum. Til Stykki og Skælings var farið til gongu, og hon varð eisini væl móttikin tá sum nú.

## Hans Martin hart raktur

Við í hesi søgu hoyrir eisini, hvussu hart raktur Hans Martin annars var. Pápi hansara Andreas Dam Andreassen, ættaður úr Kollafirði og búsettur á Eiði, fór sjálvur fjórði 19. juni 1901 til Oyndarfjarðar eftir einum nýbygdum 4-mannafari. Men báturin kom ongantíð fram. Hildið varð, at at teir høvdu kollsiglt norðanfyri Eiðiskoll og møguliga eru farnir í eini glaðu.

Longu í 1904 verður familjan aftur rakt. Tá drukna tveir beiggjar hjá Hans Martin suðuri á Vatni á Eiði. Teir vóru tann 13 ára gamli Georg og 9 ára gamli Niels. Teir vóru farnir í torv saman við mammuni. Veðrið var gott, og teir høvdu hug at fara útí, og mamman loyvdi tí. Fyrst fór tann yngri beiggin, men har var marbakki beint við land, og hann fór undir. Hin beiggi fór til hjálpar, men endin varð, at báðir druknaðu.

Henda neyðars mamma hevði eisini eina tunga lagnu. Hon hevði sum sagt misti mannin í 1901. Tá misti hon eisini ein beiggja. Árið eftir datt ein mammubeiggi hennara oman. Sum ung misti hon pápan og tveir beiggjar samstundis.

Nú misti Hans Martin fýra av seks synum. Teir sum vóru eftir vóru Palli og Øssur. Palli giftist til Norðadals og er deyður fyri nøkrum árum síðani. Øssur giftist í 1955 við Almu úr Rókini á Saltnesi, og her búsettust tey eisini. Men eftir Stella Argus gera tey av at flyta aftur til Kvívíkar, har tey flyta inn til pápan.

Øssur, sum er føddur í 1934, hevði eisini sum ungur siglt við Stella Argus. Hann var kokkadrongur við í 1951 og dekkari í 1954. Hann fekk skiparaprógv og fór í desember 1957 sum bestimaður við tí tá nýggja línuskipinum Brestir, har Júst í Túni var skipari. Hann var við Brestir nærum alla ta tíð, hetta skip var í flotanum.

## Hørð lagna

Onnur dømi eru eisini um, hvussu hart lagnan kundi raka. Ein av manningini var Joakim Hansen úr Hósvík, sum doyði frá konu og sjey børnum. Konan lá á song við tí yngsta. Við Nólsoynni í 1934 fórust ein beiggi og tríggir pápabeiggjar hansara. Umframt teir fórst eisini eitt systkinabarn og maður eina fastur.

Kitti Davisen av Sandi hevði ein beiggja, sum var jagarapilotur, og sum var deyður av vanlukku árið fyri.

## Guttorm misti eisini pápan

Guttorm Zachariassen í Havn var ein av teimum sum misti pápan við Stella Argus, og sum eisini minnist til tað. Hann greiðir soleiðis frá:

Tað er ein leygardag í oktober 1957. Tá var eg 12 ára gamal og gekk í 1. flokki í Færøernes Mellem- og Realskole. Tá gingu vit eisini í skúla leygardag.

Tá ið eg henda dag kom úr skúla og nærkist heiminum í Varðagøtu, kemur mamma mín, Astrid, oman ímóti mær og sigur, at mostir mín var vorðin sjúk, hon hevði fingið heilabløðing. Læknin hevði verið, og nú vóru boð send eftir sjúkrabilinum, tí Anna-mostir skuldi á sjúkrahúsið. Mamma vildi siga mær hetta, so eg ikki skuldi koma brestandi inn og einki vita. Støðan hjá Annumostur var hættislig, men hon livdi kortini til 5. januar í 1958.

Hesin leygardagur var ein sorgardagur, men tað skuldu ikki ganga meir enn tríggir dagar, tá vóru aftur sorgarljóð.

Henda týsdagin høvdu mamma og eg júst etið døgurða og lurtaðu nú eftir tíðindunum í Útvarpinum, tá ið røddin í tólinum sigur, at leitað verður eftir trolaranum Stella Argusi, sum skuldi vera á veg inn av sildaveiðu. Pápi mín var við Stella Argusi. Meg minnist, at mamma stóð framman fyri stovuvindeyganum og hugdi út. Eg spurdi nokk, hvat ið tað var, ið hann segði, men mamma svaraði: "Far tú bara í skúla aftur." Eg fór í skúla og skilti vist ikki álvaran í øllum hesum.

Eftir við hús var mamma mín. Hvat ið hon hevur hugsað, veit eg ikki, men eg haldi, at tankar hennara hava leitað tíggju og eitt hálvt ár aftur í tíðina til ársskiftið 1946-1947, tá ið Fuglberg, sum pápi mín, Símun Michael Zachariasen, Poul Justinussen og Poul Jacobsen høvdu keypt úr Danmørk, var á veg til Føroya í ódnarveðri, og leitað varð eftir honum í einar fjúrtan dagar. So ringt var veðrið, at eina ferð fór Fuglberg heilt runt. Torvald Thomsen úr Gøtu var eisini við henda túrin.Ta ferðina eydnaðist at bera boð í bý. Hóast mamma nú aftur hevði fingið ófrættatíðindi gjøgnum Útvarpið, so hevur vónin kortini birt henni í barmi, at tað eisini hesu ferð fór at eydnast at koma til lands.

## Vildi ikki lurta eftir útvarpinum

Útvarpið segði í tíðindunum frá, hvussu støðan var, men meg minnist, at eg vildi ikki hoyra tíðindini, so radio var sum oftast sløkt. So fingu vit tíðindini frá grannunum. Hetta var nokk mín máti at taka tað.

Ein dagin eg kom úr skúlanum til døgurða, kom eg í fylgi við einum lærarskúlanæmingi, Pauli Joensen, í Sumba, seinni lærari á Skála. Hann búði nakað oman fyri okkum. Eg spurdi hann, hvussu tað mundi ganga við at leita eftir Stella Argusi. Tá svaraði hann mær, at teir fóru ikki at koma aftur.

Eg segði honum, at pápi mín var við. Tá tók hann og legði armin um herðar mínar og kroysti meg inn at sær. Eg skilti, at hann visti ikki, at pápi mín var við.

Eg var burtur frá skúlanum í nakrar dagar, eina viku ella so. So varð farið aftur í skúla. Henda morgunin til morgunsang heitti Chr. Lützen, sum tá var skúlastjóri, á næmingarnar at vera friðarligar í skúlagarðinum, tí nú var eingin vón um at finna Stella Argus.

Tað var helst ein heilt annar dámur yvir fríkorterunum henda dagin.

Meg minnist, at eg, uttan at hugsa um tað, gjørdi eitt ella annað, tá segði ein drongur við meg: "Minnist tú ikki, hvat ið Lützen segði í morgun." Tað fór sum ein knívur ígjøgnum meg, men hesin næmingur mundi ikki vita, at pápi mín var við Stella Argusi.

## Nógv hjálpsemi

1. november var sum vanligt minningargudstænasta í Havnar kirkju fyri teir sjólátnu. Vit vóru ikki í kirkju, men nú lurtaðu vit eftir gudstænastuni í Útvarpinum. Johan Weihe, prestur, prædikaði, og hann segði millum annað, at vit livdu í vón móti vón. - Enn var kanska ein ógvuliga lítil glotti av vón eftir, so hetta árið var manningin á Stella Argusi ikki nevnd millum teir farnu. - So minningargudstænastan, har teir vóru nevndir, varð 1. november 1958, tá prædikaði Jákup Joensen, próstur.

Serliga minnist meg, at tvær grannakonur komu ofta inn á gólvið. Onnur var á aldur við mammu, hon var ófør at spyrja, um hon skuldi hjálpa til við einum ella øðrum. Hin var eldri og kom ofta at práta og troysta. Eisini minnist meg, at mostir mín, sum búði í Froðba, og kona mammubeiggja mín úr Vági ofta vóru leingi og ferðaðust hjá okkum hesa tíðina eftir tað, at Stella Argus var farin.

Eina hending fari eg at nevna aftrat. Eini 3-4 ár eftir at Stella Argus var farin, fór eg inn í klædnahandilin hjá Essaba, har Café Natúr nú er, at keypa mær ein regnfrakka. Eg spurdi Hans Petur Jacobsen, vanliga kallaður Hans á Lag, um tey høvdu regnfrakkar. Jú, vit funnu ein, sum hóskaði til mín. Hann kostaði antin 12 kr. ella 16 kr. Hans pakkaði hann inn og gav mær pakkan. So segði hann, at eg skuldi eiga hann. Har stóð eg, sum eitt stórt spurnartekin, men eg fekk kortini sagt takk fyri. Tað var hugaligt at uppliva slíkar hendingar.

Tá ið eg kom heim, fekk eg at vita, at drongur Hansinu, dóttur Hans á lag, var við Stella Argusi. Hann æt Hilbert Johannesen og var úr Vestmanna. Ætlanin var, at tey skuldu giftast heilt skjótt.

Stundum havi eg hugsað, at vit kundu fingið boðini øðrvísi enn gjøgnum Útvarpið. Men hugsar ein um, hvussu viðurskiftini vóru tá, og kanska júst um tað mundið ella í tí løtuni, so skilir ein tað væl. Tá var ikki bilur á hvørjum geilarhorni og ikki telefon í hvørjum húsi.

Vit høvdu onga telefon. Standurin á skrivstovuni hjá Poul Hansen man nokk heldur ikki hava verið tann besti, og um eg seti meg í teirra stað, so hevði eg nokk ikki viljað verið tann, ið skuldi bera slík boð. Vit vóru heldur ikki gloymd fleiri jól eftir hetta, tí hvørji jól fingu vit ein kassa við súreplum frá Poul Hansen, og tað var forkunnugt tá í tíðini.

Nú eftir fáum døgum, vóru tvey farin úr okkara heimi, mostir mín og pápi mín. Nógv kom at verða øðrvísi, men lívið skuldi halda fram hjá okkum, ið eftir vóru, og tá ið ein nú kagar aftur í tíðina, so kemur ein kortini til tað, at hann, sum øllum valdar, hevur verið góður.

## Einki varð tosað

Asger Højlund var prestur í Kvívík hesa tíðina. Hann hevði sum vera mann nógv um at vera at ganga til allar hesar familjurnar, sum høvdu mist so nógv. Men tá var einki, sum æt kreppuhjálp. Í dag verður ásannað, at besti háttur at koma víðari eftir eina slíka sorg er, at tað verður tosað um tað. Men tað gamla var, at tað skuldi tosast minst møguligt, og hetta longdi bert pínuna. Sjálvt í dag aftaná 50 ár hava fleiri ringt við at tosa um hetta.

Tann 10. november varð minningargudstænasta hildin í Kvívíkar kirkju, og her var sum vera man nógv fólk.

## Reiðaríið

Tað hevur sjálvsagt staðið nógv á reiðaranum Poul Hansen og soni hansara Aksel, sum vóru nevndarformaður og næstformaður í p/f Kimbil. Tann 4. november hevði p/f Kimbil nevndarfund, sum man hava verið tann tyngsti í søguni hjá felagnum. Dagsskráin var Stella Argus. Í fundarbókini varð greitt frá gongdini, soleiðis sum hon er lýst í hesi grein.

Fundarbókin endar soleiðis, aftaná at staðfest er, at givist er við leitingin:

"Vit mugu tí gera okkum klárt, at tað var hend ein ólukka, soleiðis at Stella Argus var gingin burtur av eini ella aðrari orsøk við allari manning síni, tilsamans 22 manns.

Henda ólukka sum kostaði 22 mannalív er somikið syrgiligari av tí, at eftir sita 8 einkir við 21 faðirleysum børnum.

Fundurin endaður."

Seinni vóru Poul og Aksel eisini til minningargudstænastur í Kvívík og Hósvík.

Í 1959 kom Fríðrikkur kongur til Føroya á vitjan. Hann kom tá eisini til Kvívíkar. Tá var gjørdur ein minnisvarði fyri manningini á Stella Argus og kongur avdúkaði hann. Tað var Asger Højlund sum skipaði fyri hesum minnisvarða.

Tað er ein sjálvfylgja, at henda dapra hending verður mint, nú 50 ár eru farin. Hetta verður millum annað gjørt við at ein minnisvarði, latin av teimum hjá reiðaranum Poul Hansen, verður avdúkaður í Kvívík komandi sunnudag. Vit koma eisini at hava frásøgn frá hesi hending eins og vit fara at hava meira tilfar um hana.

Henda grein er eisini skrivað fyri at æra minnið hjá hesum 22 fiskimonnum.